# KIRKJA

Fólkatal: 21 (2017). Fugloyar Kommuna. / *Population: 21 (2017). Municipality of Fugloy.*








Her ert tú
*You are here*

WC
*Toilet*

Hjartastartari
*Defibrillator*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

## FO

Kirkjan á kirkju er ein prýðilig ímynd av bygdini, sum hevur givið íblástur til føroyska málningalist og skaldskap. Her kanst tú njóta friðin og stórbæra útsýnið, vitja forkunniga handilin í Geil, og droyma teg burtur í hugtakandi sagnum.

### Søga

Kirkja er nevnd í Hundabrævinum (1350-1400), men óvist er, hvussu langt frammanundan hesum, fólk hava búð á Kirkju. Navnið stavar frá tíðarskeiðnum, tá ið einasta kirkjan á Fugloynni var á Kirkju. Fólkatalið var hægst í 1920-unum, tá ið upp ímóti 150 fólk búðu her. Fráflytingin tók dik á seg í 1960-unum, og nú búgva færri fólk á Kirkju enn í 1801, tá ið 31 fólk búðu í bygdini. Landbúnaður, útróður og ríku fuglabjørgini hava myndað lívið á Kirkju í øldir, og nú er ferðavinnan vorðin eitt ískoyti afturat til samansetta arbeiðsmynstrið.

### Kirkjan á Kirkju

Louis Zachariasen hevur teknað kirkjuna (1) við teimum gomlu trækirkjunum sum fyrimynd, og tekningin varð latin kirkjuni sum gáva. Kirkjan varð vígd 28. mai í 1933.

### Altartalvan: Jesus gongur eftir sjónum

Sámal Joensen-Mikines (1906-1979) málaði altartalvuna 'Jesus gongur eftir sjónum í 1933´, og hon var fyrsta bílegging hansara í Føroyum. Eyðkend føroysk bjørg hevja seg í baksýninumi, og menn í útróðrarbáti hyggja at, ímeðan Jesus dregur neyðstædda Pætur upp úr sjónum. Fjarstøðan og náttúran í Fugloy góvu Sámal Joensen-Mikinesi høvi at menna ein meira ekspressivan hugburð til landsløg uttan um seg, og hetta sæst aftur í fleiri málningum, ið kallast 'Útsýnið av Kirkju'.

### Sjúrðarsporið

Søgnin um floksmenninar úr Hattarvík, sum royndu at leggja allar Føroyar undir seg, hevur sett síni spor á Kirkju. Bygdarfólkið flýddi inn í kirkjuna, tá ið floksmenninir vápnaðir ætlaðu at leggja Kirkju undir seg, men tey gloymdu eitt barn í skundinum. Sjúrður við Kellingará, sum floksmennirnir noyddu upp í sín part, var tann skjótasti og fyrstur oman í bygdina. Hann royndi at fjala barnið fyri hinum við at syfta tað yvir um eina lon, men tað fall deytt til jarðar, tí Sjúrður var ov harðligur, tá hann rendi spjótið í klæðini á barninum. Fótasporðið, sum Sjúrður sigst hava staðið í hesa vanlukku løtu, hevur síðani itið Sjúrðarspor (2).

### Skúlin

Skúlin á Kirkju (3) varð bygdur í 1888, og her gingu 50 næmingar, tá ið fólkatalið var sum mest. Í 1990-unum kom framhaldsdeild í skúlan á Kirkju, sum hevur staðið tómur síðani 2015, tá ið seinasti næmingurin varð liðugur við 9. flokk.

### Toftin á Trøppunum

Toftin á Trøppunum (4) sæst í bønum norðan fyri Kirkju og er farvegur eftir forvitnisligan fornan bústað. Søgn er, at ein maður, ið kallaðist Diskur, einaferð búleikaðist her. Tað sigst, at hann varð tikin í at hava stolið seyð, tá ið hol kom á ein pjøka, sum hann blakaði oman í ein bát, og stiklið á einum markaðum veðrahorni kom undan.

### Gamli handilin í Geil

Vert er at vitja handilin í Geil (5), tá ið tú ert á Kirkju. Handilin læt upp aftur í 2014, og hann er ein sjarmerandi bygdarhandil, har vanligar brúksvørur fáast. Vørurnar standa framvegis á søguligu hillunum, sum vóru nýttar, tá ið gamli handilin í Geil var opin. Heimagjørdar vørur, sum eru framleiddar á Kirkju, eru eisini at fáa í handlinum.

### Rúnarbundna rættin

Leivdirnar av eini sagnamiklari rætt (6) síggjast niðanfyri í bønum á veg oman á kaiina. Á Kirkju er søgn, at Guttormur Rasmusson (1657-1737), kallaður Guttormur í Múla, ið bar orð fyri at vera ramur í gandi, rúnarbant rættina, tá hann vitjaði í bygdini. Rættin varð gandað soleiðis, at seyður, ið var fingin í rætt, ikki kundu leypa úr aftur rættini. Gandurin skuldi vara við, líka til onnur rætt varð bygd á Kirkju.

### Fuglurin: Ból og Biti

Innivist og góður matur fæst í Fuglinum (7) – eitt hugnaligt B&B, ið verður rikið av fólki í bygdini. Til ber at bíleggja heitan mat, matpakkar, kaffi o.a. Skipað verður eisini fyri gongutúrum í oynni. Neyðugt er at bíleggja frammanundan. Neyvari kunning fæst á Norðoya kunningarstovu.

## EN

*The picturesque church on Kirkja is an icon of the village, that has inspired faroese artwork and poetry. In the village you can enjoy the magnificent view, visit the historic shop in Geil, and immerse yourself in the enchanting tales of the village. Kirkja is the Faroese word for church.*

### History

*Kirkja is mentioned in Hundabrævið (The Dog Letter) (1350-1400), but for how long before this period people have lived in the village, it is not known. The name originates from the period when the only church in Fugloy was in Kirkja. The population was at its highest in the 1920s when up to 150 people lived here. The number of villagers who relocated accelerated in the 1960s. Now fewer people live in Kirkja than in 1801, when there were 31 inhabitants in the village. Agriculture, fishing and the abundant bird cliffs have formed the life in Kirkja for centuries, and now tourism has become a supplement to the intricate work pattern.*

### The Church in Kirkja

*Louis Zachariasen designed the church (1) with inspiration from the old wooden churches, and the design was donated to the church as a gift. The church was consecrated on the 28th May 1933.*

### The Altarpiece: Jesus Walks on Water

*Sámal Joensen-Mikines (1906-1979) painted the altarpiece „Jesus gongur eftir sjónum" in 1933. It was his first commissioned work in the Faroe Islands. Characteristic cliffs rise in the background, and men in rowboats look on as Jesus pulls the imperilled Pætur from the sea. The distant location and the nature of Fugloy helped Mikines develop a more expressive attitude to the landscapes around him, and this can be seen in several paintings called "The view from Kirkja".*

### Sjúrðarsporið – The Footstep of Sjúrður

*The legend of the Floksmenn from Hattarvík, the rebels who tried to seize power of the Faroe Islands, has left its mark on Kirkja. The villagers fled into the church when the armed Floksmenn wanted to seize Kirkja, but in their haste the villagers left a child behind. Sjúrður við Kellingará, whom the rebels had forced to join them, was the first to arrive in the village. He tried to hide the child from the other rebels by throwing it over a house, but it fell dead to the ground because Sjúrður had been too rough when he stuck his spear through the child's clothes. The place where Sjúrður stood in at this moment was henceforth called the footstep of Sjúrður (2).*

### The School

*The school in Kirkja (3) was built in 1888. 50 pupils attended the school when the population was at its highest. In the 1990s, the lower secondary school was established in Kirkja. The school has stood empty since 2015 when the last pupil finished school.*

### The House Ruins in Trøppunum

*The house ruins in Trøppunum (4) can be seen in the field to the north of Kirkja and is the trace of an interesting ancient residence. Legend has it that a man called Diskur once resided here. It is said that he was caught stealing sheep when a bundle that he tossed into a boat ripped open and the tip of a marked ram's horn appeared through the rip.*

### The Old Shop in Geil

*The shop in Geil (5) is well worth a visit when you are in Kirkja. The shop re-opened in 2014, and it is a charming village shop where articles for everyday use can be bought. The products are displayed on the historical shelves which were in use when the old shop in Geil was open. Homemade goods produced locally can be bought in the shop.*

### The Spellbound Sheepfold

*The remains of a legendary sheepfold (6) can be seen in the field on the way down to the quay. In Kirkja legend has it that Guttormur Rasmusson (1657-1737), called Guttormur í Múla and known for his skills in sorcery, cast a spell on the sheepfold when he was visiting the village. After the spell was cast on the sheepfold, any sheep that was led into the sheepfold could not jump out of it again. The spell would last until another sheepfold was built in Kirkja.*

### Fuglurin: Bed & Breakfast

*Lodging and good food can be had in Fuglurin (7) – a comfortable Bed & Breakfast which is run by the villagers. Among other things, it is possible to order hot meals, packed lunches and coffee. Hikes on the islands are also arranged. It is necessary to order in advance. For more detailed information, contact Visit Norðoy.*

---

Visit Norðoy

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

---

### Ver ein hjálpirót

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

### Be a helping root

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

### Tá ið tú fert til fjals

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

### Hiking advice

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

---

## VIT VIÐMÆLA

### Útsýnið úr bygdini

Tað er ikki av tilvild, at listamálarin Sámal Joensen-Mikines nýtti útsýnið av Kirkju sum myndevnið. Úr náttúruvøkru bygdini er stórsligið útsýnið til Svínoyar, Viðoyar og Borðoyar, sum reystar stíga úr havinum framman fyri tær. Tað er vert at steðga á og njóta sjónina, sum eisini gav S. P Zachariassen íblástur til yrkingina Várlongsul. Triðja ørindi ljóðar soleiðis:

„Mær leingist at síggja teg, fjallanna tind,
sveiptan í dúnmjúka hami,
leggja á havið ta alføgru mynd,
tá sóldráttur stígur um kvøldanna grind
– hin ljósi, hin fríði, hin rami."

### Serlig atlit

Verið varin, tá ið tit nærkast støðni ella kaiini. Tað rekur hart fram við landi.

## LOCAL'S CHOICE

### The View from the Village

*It is no coincidence that the painter Sámal Joensen-Mikines used the view from Kirkja as a subject. From the scenic village there is a magnificent view of the islands Svínoy, Viðoy and Borðoy, that proudly rise from the sea in front of you. It is worth stopping and enjoying the view that inspired not only the paintings of Mikines but also the poetry of S.P. Zachariassen.*

*„Im longing to see you mountain top*
*wrapped in soft and fluffy fur*
*Portraying a beautiful image on the sea*
*When the rays of the sun reside*
*– the light, the peace, the power."*

### Be aware

*Be careful when approaching the landing-place or the quay as the current is rather strong along the coast.*